Uppskot til semju millum

**Føroya Reiðarafelag** øðrumegin

og

**Maskinmeistarafelagið** og
**Føroya Skipara- og Navigatørfelag** hinumegin

Partarnir eru samdir um at leingja sáttmálan, sum gjørdur varð 30. mai 2020, í eitt ár til 1. apríl 2023.

**§ 34. Gildi sáttmálans**

Hesin sáttmáli hevur gildi frá 1. apríl 2022 at rokna. Sáttmálin kann uppsigast við 2 mánaða freist til ein 1. apríl, tó í fyrsta lagi 1. apríl 2023.

Í sambandi við sáttmálan í 2020 varð gjørt eitt protokollat:

**"Protokollat**

*Vísandi til § 17, stk. 2 eru landingarútreiðslur loyvdur frádráttur í øllum bólkum.*

*Ásannandi at ávís ógreiða hevur verið í sambandi við frádrátt fyri landingarútreiðslur, eru partarnir samdir um í sáttmálaskeiðnum at fáa greiðu á teimum spurningum, sum máttu verðið í sambandi við hesar frádráttir, og í undirskjali at nágreina, hvørjar landingarútreiðslur eru at rokna sum loyvdir frádráttir."*

Partarnir hava nágreinað landingarútreiðslurnar og er semja um fylgjandi frádráttir fyri ísfiskatrolarar í bólki 2 og ísfiskalínuskip í bólki 3.

Ísfiskatrolarar:

- Kør: 0,55 kr/kg
- Kassar: 0,80 kr/kg
- Gulllaksur: 0,35 kr/kg
- Leyst: 1,00 kr/kg

Ísfiskalínuskip:

- Kassar/kør: 0,84 kr/kg

Upphæddin verður tillagað lutfalsliga í mun til broytingar í tímalønini fyri ófaklærd í sáttmálanum millum Føroya Arbeiðsgevarafelag og Føroya Arbeiðarafelag tann 1. mai 2021 (135,56 kr/tíman).

Tórshavn hin 23. apríl 2022

**Vegna**
**Føroya Skipara- og Navigatørfelag**

Annfinnur Garðalíð
Formaður FSN
Tlf. 216973

*Annfinnur Garðalíð*
Formaður

*Annfinn Fagraklett*
Nevndarlimur

*Kristen Friis*
Nevndarlimur

**Vegna**
**Maskinmeistarafelagið**

*Ólavur Gunnarsson*
Formaður

*Regin Olsen*
Næstformaður

**Vegna**
**Føroya Reiðarafelag**

*Hanus Hansen*
Formaður

*Stefan í Skorini*
stjóri